<u>Aðalfundur í Listafelag Føroya 30. juni 2022</u>

Listafelagið hevur seinasta ár ikki verið serliga virkið. Hetta skyldast fyrst og fremst tær avmarkingar, sum farsóttin setti fyri allar samkomur. Ólavsøkuframsýningina skipaðu vit tó fyri soleiðis sum vit hava gjørt í øll árini.

<u>Ólavsøkuframsýningin 2021</u>

Felagið heitti á vári 2021 á Hansinu Iversen, listakvinnu, um at standa fyri framsýningini. Hansina tók á seg uppgávuna og setti saman eina fjølbroytta framsýning. Hon nýtti  eisini høvið at heiðra okkara mæta listamann Ingálv av Reyni, sum hevði fylt hundrað árið fyri, við úrvalsverkum og katalogi um listamannin. Hansina Iversen hevði biðið listafólkini Jóhan Martin Christiansen, Rannvá Kunoy, Julie Sass og listaummælaran Kinnu Poulsen skriva hvør sín tekst um Ingálv av Reyni til katalogið, sum eisini innihelt verklista og var lutaseðil til vinning. Hansina Iversen og Jón Sonni Jensen stóðu fyri at hanga framsýningina upp. Málningurin Kompositión frá 2001 prýddi plakatina og katalogið, og málningurin var at síggja á framsýningini. Svanna Højgaard Joensen sniðgav plakat og katalog. Íalt 22 listafólk sendu verk inn til framsýningina.

Tá vit eftirmettu framsýningina saman Hansinu, vóru vit sum heild vælnøgd. Hon var væl vitjað, væl móttikin og væl varð selt. Ein viðmerking var tó, at samstarvið við Listasavnið var eitt sindur tungt. Vit eiga at fáa tey formellu viðurskiftini við Listasavnið uppá pláss. Sum er, er samskiftið við leiðsluna har ov tungt. Formaðurin og næstformaðurin hava hava haft fund leiðaran uttan at tað spurdist nakað serligt burtur úr, tí leiðarin fyri savnið ikki sá at vit høvdu nakran trupulleika, t.d. at vit skulu gjalda fyri at hava framsýningina. Vit hava tí avgjørt at biðja um fund við formannin fyri stýrið fyri Listasavnið.

Listaferð í farna ári:

Listafelagið skipaði fyri útferð til Suðuroyar leygardagin 19. juni. Vit fóru við Smyrli av Havnini kl. 7 á morgni. Ein bussur sum tók 40 fólk stóð fyri okkum á Drelnesi. Koyrt verð fyrst gjøgnum nýggja bergholið til Hvalbiar. Í Hvalba vitjaðu vit á Eiðunum - Fiskieiðið og Norðbergseiðið. So vitjaðu vit í SALT og ótu miðmála har aftaná. Vit fingu rundvísing og frásøgn um húsið. Eisini sóu vit ein stuttan film um Ruth Smith, sum Árni Nicolajsen hevur leikstjórnað. Eftir SALT koyrdu vit til Vágs. Steðgaðu í Nesi, har Ruth búði og virkaði og síðani segði Maud Benjardøgg frá inni á savninum, har verk eftir Ruth Smith hanga. Vitjanin i Suðri endaði við at koyrdi suður á Akraberg í góðveðrinum og vóru so aftur í Havn um nýggjutíðina.

Komandi listaferð út í heim.

Næsta ferðin skuldi vera til Stockholmar seinasta heyst, men vegna Corona varð hon ikki fyriskipað.

Átøk í Føroyum:

Vit hava ætlað at siggja myndprýðingina av skúlanum á Fløtum, men enn er tað ikki framt.

Stuðul í 2021

Vit hava ikki lata stuðul í farna ári.

Keypt verk í 2021

| | | |
|---|---|---|
| 25.03 | Jóhan M. Christiansen 2 stk. | 13.000,-- |
| 22.06 | Jón Sonni Jensen | 6.500,-- |
| 13.12 | Anker Mortensen | 45.000,-- |
| Tilsamans | | 64.500,-- |

Í vár hava vit keypt ein málning frá Bárður Jákupsson fyri kr. 14.000 og ein frá Bárður Dal Christiansen fyri kr. XXX

Pál Weihe, formaður